Semja

millum

Føroya Arbeiðsgevarafelag
og
Starvsmannafelagið

Omanfyri nevndu partar eru í dag samdir um at leingja sáttmálarnar fyri Føroya Tele og Posta til 1. januar 2013 við niðanfyri standandi broytingum.

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:
   Hin 1. januar 2011 1,25 %
   Hin 1. januar 2012 2,37 %

2. § 9, stk. 2 í báðum sáttmálunum verður orðað soleiðis:

   "Eftirsitiløn er miðaltalið av fullu lønini seinastu 12 mánaðirnar, sum viðkomandi hevur arbeitt fulla tíð. Lønin í mánaðinum, tá ið starvsfólkið doyði, verður ikki roknað uppí eftirsitiløninа."

3. Nøkur starvsfólk á Posta hava higartil fingið tey 5,5%, sum eru nevnd í §13, stk. 2, útgoldin. Partarnir eru samdir um, at hetta útgjald í sáttmálaskeiðnum skal broytast til eftirlønargjald soleiðis:

   1. januar 2011 rinda starvsfólkini 0,5% í eftirlønargjaldi og 5% verða útgoldin.
   1. januar 2012 rinda starvsfólkini 2% í eftirlønargjaldi og 3,5% verða útgoldin.

   Tá eftirløn verður umroknað til løn verður hetta gjørt við lutfallinum 0,8.

4. Partarnir eru samdir um, at í sáttmálaskeiðnum verður settur bólkur við umboðum fyri báðar partar, 3 frá hvørjum partinum, at endurskoða útberingarskipanina á Posta.
   Í seinasta lagi 01. juli 2011 letur arbeiðsbólkurin úr hendi sína niðurstøðu.

5. Partarnir eru samdir um innan 1. januar 2012 at hyggja eftir verandi eftirlønarskipan við tí fyri eyga at fáa samvar millum sáttmálatekst og praksis.

Tórshavn, 21. december 2010

Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag

Jóhan Páll Joensen, formaður

Kristoffur Laksá, samráðingarleiðari

Fyri Starvsmannafelagið

Selma Ellingsgaard / Anna Johannesen

Súni Selfoss

Niels á Reynatúgvu

Osvald Joensen

Maud á Geilini